# Kunnu koma at hanga í leysari luft á Skála

**Hóast ætlanin er at fara undir nýbygningin á Skála longu í heyst, hevur landsstýrið enn onga umsókn fingið um at fáa pólskar sveisarar til landið. Tað er heldur ongin avtala fingin við donsku stjórnina um, hvussu slík mál skulu avgreiðast og sostatt hongur øll ætlanin eitt sindur í leysari luft. Men landsstýrismaðurin lovar, at tá ið umsóknin kemur, verður hon við viðgjørd við vælvild**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Enn er ikki søkt um arbeiðs- og uppihaldsloyvi til pólsku sveisararnar, sum eftir ætlan skuldi koma inn á Skála at sveisa skrokkin til nýbygningin hjá Thor í Hósvík, so tað verður sum til skræddarans barsil*

Ætlanin at fáa pólskar sveisarar til Føroya at sveisa skrokkin til skipið, sum Thor í Hósvík ætlar byggja á Skála, kann fáa eitt skot fyri bógvin.

Ætlanin er at fara undir arbeiðið í heyst og í tí sambandi er ætlanin at fáa pólskar sveisarar til Skála at sveisa skrokkin.

Men hóast tað bara eru tveir, tríggir mánaðir til arbeiðið skal byrja, er enn ongin umsókn send landsstýrinum um at fáa pólskar sveisarar til Føroya at gera arbeiðið.

Teir pólsku sveisararnir, sum skulu gera arbeiðið, skulu hava loyvið frá landsstýrinum at koma til Føroyar at gera arbeiðið.

Men Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, staðfestir, at innlendismálaráðið hevur onga umsókn fingið um at fáa pólskar sveisarar til Føroya at gera skrokkin til skipið hjá Thor.

Samstundis staðfestir hann, at enn er ongin avtalað fingin við donsku stjórnina um, hvussu slík mál skulu avgreiðast.

– Hetta var ein spurningur, sum vit umrøddu tá ið danski ráðharrin, Rikke Hvilshøj var her fyrr í summar.

– Vit avráddu, at hetta var eitt mál, sum vit skuldu royna at finna eina mannagongd fyri.

Hon segði, at dømi sum hesi eru kend í Danmark og at eru undirtøka fyri tí í Føroyum, eiga vit at finna eina avtalu ímillum landsstýrið og donsku stjórnina um, hvussu slík mál skulu avgreiðast.

Jacob Vestergaard sigur, at tá ið Rikke Hvilshøj var í Føroyum, varð endamálið at finna eina avtalu ímillum londini bæði rættiliga skjótt.

– Vit tosaðu um at vit skulu fáa greiði á viðurskiftunum í næsta mánað, sigur hann.

Men skuldi tað hent, at ein slík avtala ikki fæst í lag innanfyri tann tíðarkarm, sum er løgd, hevði tað ikki verið fyrstu ferð, at tað ikki gekk eftir ætlan.

Landsstýrismaðurin sigur, at tá ið umsóknin kemur um at fáa pólskar sveisarar inn á Skála til hetta ávísa arbeiðið, fer umsóknin at verða viðgjørd við vælvild.

– Men hóast tað, tekur tað altíð eitt sindur av tíð at avgreiða eina slíka umsókn. Politiskt skuldi ongi bein verið í hesum, men vit skulu kortini hava eina avtalu við donsku stjórnina um, hvussu mannagongdin skal vera í slíkum málum, tí tað er danska stjórnin, sum hevur myndugleikan.

Men tað er ein fortreyt hjá Jacob Vestergaard, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru samdir um ætlanina.

Tí vil hann eisini hava eina undirskrivaða avtalu ímillum arbeiðsgevara og handverkarafelag um ætlanina.

Samstundis skal landsstýrið tryggja sær, umstøðurnar hjá útlendsku sveisarunum eru forsvarligar, tvs, at býli, løn og onnur viðurskifti, eru nøktandi.

Hóast talan her er um eitt arbeiði, sum tekur meiri enn eitt hálvt ár, heldur Jacob Vestergaard, at ætlanin at fáa póllendingar higar at sveisa skrokkin til skipið hjá Thor, kann samanberast við tað, sum tey nevna montørsáttmálarnar.

– Tað eru avtalur, har útlendingar koma higar í avmarkaða tíð, sum ikki skal vera longri enn tríggjar mánaðir, har tað ber til hjá útlendingum, at koma til Føroya at montera ella umvæla eina motor, ella eina maskinu o.a, sum føroyingar ikki hava fortreytir at gera sjálvir.

– Í hesum føri er talan um ein útlendskan undirveitara, sum sendir nøkur fólk til Føroya at gera eina heilt ávísa uppgávu og hóast talan er um meiri enn tríggjar mánaðir, heldur hann, at slíkt eigur at koma undir somu treytir sum montørsáttmálan, tí er talan um eina heilt avmarkaða uppgávu og so fara teir av landinum aftur.

## Kann vera gagnligt fyri føroyskt handverk

**– At útlendingar koma higar at gera ávísar uppgávur, kann gagna føroyskum handverki, men tað krevst størsta varsemi, heldur landsstýrismaðurin í innlendismálum**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*Aki@sosialurin.fo*

– Tað kann verða gagnligt, at avtalur, sum hendan verða gjørdar.

Tað heldur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum.

Hann sipar til ætlanina um at fáa pólskar sveisarar til Føroya at sveisa skrokkin til nýbygningin hjá Thor í Hósvík.

Í hesum føri fáa vit útlendingar til Føroya at gera eitt arbeiði, heldur enn at fáa arbeiðið gjørt í utlandinum. Í hesum føri hava vit ikki fólk at sveisa skrokkin og tí er hetta ikki í kapping við føroyska arbeiðsmegi.

Hinvegin ásannar hann, at tað er neyðugt at vísa størsta varsemi í slíkum føri, tí tað má ikki verða so, at støðið verður máað undan føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Men Jacob Vestergaard sigur, at hann dugir ikki at síggja, at hendan avtalan um sveisararnar á Skála á nakran hátt skal skapa fordømi fyri aðrar ætlanir um at gera slíkar avtalur.

Hann dugir heldur ikki at síggja møguleikan fyri at gera slíkar avtalur á øðrum økjum, eitt nú í sambandi við tímalønt arbeiði.

Og hjá honum er tað ein avgjørd fortreyt fyri slíkum avtalum, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru samdir.

Í hesum føri er tað tí ein fortreyt, at Landsfelag Handverkaranna tekur undir við ætlanini.

– Á hesum øki verður politikkurin í hvussu so er ikki tann, at tað skal bera til hjá útlendingum at koma til Føroya at arbeiða á føroyskum flakavirkjum, fyri at taka eitt dømi, sigur landsstýrismaðurin.

# Onki ímóti at Smyril hevur fingið skeinkiloyvi

**Landsstýrismaðurin, sum umsitur Strandferðsluna, sær onki skeivt í, at tað nú eisini verður loyvt at skeinkja umborð á Smyrli**

SKEINKILOYVI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Fyrimunurin við at Smyril fær skeinkiloyvi er, at so kunnu tey sjálvi hava eftirlit við, hvussu nógv tey skeinkja og hvønn tey skeinkja til, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður*

– Eg dugi ikki at síggja nakað skeivt í, at Smyril nú eisini fær skeinkiloyvi.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, sum eisini umsitur Strandferðsluna, hevur onki ímóti, at Smyril nú fær skeinkiloyvi.

Sum vit søgdu í Sosialinum í gjár, hevur Strandferðslan søkt um at fáa hálvt skeinkiloyvi til Smyril og loyvisnevndin hevur givið tilsøgn um at ganga umsókini á møti.

Nú skulu ymisk formlig viðurskifti fáast í rættlag og so verður endaligt skeinkiloyvi skrivað.

Tað, sum Strandferðslan hevur søkt um til Smyril, er eitt hálvt skeinkiloyvi, sum gevur rætt at selja øl og vín.

Heini á Borg á Strandferðsluni, segði við Sosialin í gjár, at Smyril skal ikki verða eitt flótandi vertshús og ætlanin er bara at selja nøkur sløg av hvítvíni og reyðvíni og pilsnarøl. Gulløl verður ikki selt, hóast loyvið eisini umfatar tað.

Og skeinkiloyvið er ikki givið til alt skipið, men bara til matstovurnar á 6. dekki.

### Ikki fortreð av tí

Tað kemur ikki óvart á landsstýrismannin í samferðslumálum, at Smyril hevur fingið skeinkiloyvi.

– Áðrenn Strandferðslan søkti um loyvið, spurdu tey landsstýrismannin, hvørja støðu, hann hevur til, at Smyril fær skeinkiloyvi.

Jacob Vestergaard sigur, at hann hevur onki ímóti, at Smyril fær eitt hálvt skeinkiloyvi.

– Heldur Strandferðslan, at skeinkiloyvi er ein partur av matstovuvirkseminum umborð á Smyrli, havi eg ikki fortreð av tí, sigur hann.

Hann heldur, at tað eigur at bera til at skeinkja undir skipaðum viðurskiftum og tað ivast hann ikki í, verður galdandi umborð á Smyrli.

– Tað síggi eg onki skeivt í.

Samstundis staðfestir hann, at ongar ætlanir eru um at gera Smyril til eina siglandi barr og tað verður heldur ikki so.

– Men ofta er tað betri at skeinkja undir skipaðum viðurskiftum, heldur enn tann óskipaða skeinkingin, sum nú fer fram.

– Tað er onki dulsmál, at sum støðan er nú, verður rúsdrekka mangan dragsað umborð á Smyrli og tá er tað manningin, sum fær upptakið av teirri óskipaðu rúsdrekkanýtsluni, sum er.

– Fyrimunurin við at Smyril fær skeinkiloyvi er, at so kunnu tey sjálvi hava eftirlit við, hvussu nógv tey skeinkja og til hvønn tey skeinkja.

– At tey sjálvi fáa skeinkiloyvi, áleggur eisini eina skyldu á tey um at hava eftirlit við søluni og tað stúri eg ikki fyri, sigur Jacob Vestergaard.